## Avbjóðingar úr Jákupsbrævinum

# Tungan hevur mátt



# Ják 3,1-12

v1 Verðið ikki mangir lærarar,
brøður mínir, við tað at tit vita, at
vit skulu fáa tess tyngri dóm.v2 Tí
at vit snáva allir í mongum lutum;
um einhvør ikki snávar í talu, tá er
hann ein fullkomin maður, sum er
førur fyri at hava teymahald eisini
á øllum likaminum. v3 Tá ið vit
leggja boygsl í munnin á
hestunum, fyri at teir skulu akta
okkum, tá stýra vit eisini heila
likami teirra. v4 Sí, eisini skipini,
so stór sum tey eru og førd av
hørðum vindum, so verða tey tó
stýrd við einum ógvuliga lítlum
róðri, hagar sum stýrimaðurin
ætlar sær. v5 Soleiðis er eisini
tungan ein lítil limur og ger nógv
um seg. Sí, hvussu lítil neisti kann
seta eld á ein stóran skógv! v6 Og
tungan er eldur. Sum ein heimur
av órætti er hon millum lima
okkara; hon dálkar alt likamið og
setir eld á tilverunnar hjól, og
hana sjálva er settur eldur á frá
helviti.v7 Tí at ein og hvør
náttúra, bæði í djórum og fuglum,
bæði í skriðkyktum og sjódjórum
kann verða tamd og er vorðin
tamd av mannanáttúruni; v8 men
tunguna kann eingin menniskja
temja, hetta óflýggjaliga illa, fult
av drepandi eitri. v9 Við henni
vælsigna vit Harran og faðirin, og
við henni banna vit menniskjum,
sum eru skapað í Guðs líki. v10 Úr
sama munni koma signing og
banning. Hetta eigur ikki at vera
so, brøður mínir. v11 Kann tá
keldan geva bæði søtt og beiskt
vatn úr somu uppkomu?v12 Kann
tá eitt fikutræ, brøður mínir, geva
av sær oljuber, ella eitt víntræ
fikur? Ikki heldur kann ein sølt
kelda geva søtt vatn.

# Gamla og nýggja menniskjað

- Hvør hevur teymarnar?
  - Tá ið tú gert tað, ið gott er, kanst tú treystliga hyggja upp; men tá ið tú ikki gert tað, ið gott er, tá liggur syndin fyri durunum og tráar eftir tær; men tú eigur at vinna á henni!« (1 Mos 4,7)
- Eitt nýtt EG
- Boygsl í munnin
- Róður og skip

# Hvør stýrir?

- Róðursmaður og skiparin
- Kumpassin

# Tungan er eldur

- Sí, hvussu lítil neisti kann seta eld á ein stóran skógv. (v5)
- Tungan er sum ein heimur av órætti millum lima okkara v6.
- Halda fyri gjøldur, hevur stórt vald
- Gangið fram í andanum, og tá skulu tit als ikki fullføra girnd holdsins. (Gal 5,16)

# Kvirra og samtala

- Kvirra meðan vit hugsa um:
  - Tungan hevur stóran mátt – til bæði gott og ringt. Finn jalig og neilig dømi um tann stóra mátt tungan hevur.
- Eftir kvirruna tosa vit saman um sama spurning.

# Orð er skapandi

- Tí at vit snáva allir í mongum lutum; um einhvør ikki snávar í talu, tá er hann ein fullkomin maður, sum er førur fyri at hava teymahald eisini á øllum likaminum. (Jak 3,2)
- Tú kanst gera mun

# Satt ella falskt

- Tú mást ikki bera rangan vitnisburð um næsta tín
- Bann ella boð
- Lygn
- Baktala

# Róðrið og skipið

- Róðrið = Tungan
- Skipið = menniskjað

# Skiparin í tínum lívi?

- Kann tá eitt fikutræ, brøður mínir, geva av sær oljuber, ella eitt víntræ fikur? Ikki heldur kann ein sølt kelda geva søtt vatn. (4,12)
- Hvat tá? Eiga vit at synda, av tí at vit eru ikki undir lóg, men undir náði? Á ongum sinni! Vita tit ikki, at tá ið tit bjóða tykkum fram til einshvørs sum tænarar til lýdni, tá eru tit tænarar hjá honum, sum tit lýða, annaðhvørt hjá synd til deyða ella hjá lýdni til rættvísi? …. bjóðið heldur Guði tykkum sjálv fram sum livnað upp frá deyðum, og Guði limir tykkara sum rættferðarvápn. (Róm 6,15-16 og 13b)
- Hvør tann, sum verður verandi í honum, syndar ikki… Hvør tann, sum er føddur av Guði, ger ikki synd, tí at sáð hansara verður verandi í honum, og hann kann ikki synda, tí at hann er føddur av Guði. (1 Jóh 3,6f)

# Kvirra og samtala

- Kvirra meðan vit hugsa um:
  - Hvat kunnu vit gera, so vit ikki snáva í talu (v2)?
  - Hvussu kann signing komu úr munni okkara (v10)?
- Eftir kvirruna tosa vit saman um sama spurning.